Lesarabrøv

Yvirlýsing

Á aðalfundi Deyvafelagsins hava undirritaðu avgjørt við hesi yvirlýsing at vísa á tann stóra týdning ein tolkatænasta hevur fyri tey deyvu í samfelagnum.

Í øllum Norðurlondum eru tolkar til taks og har finst eisini tolkaútbúgving.

Deyvafelag Føroya ger vart við, at stórur tørvur er á eini tolkatænastu í Føroyum.

Vit kenna okkum avbyrgd í samfelagnum. Stórur skilnaður er millum hoyrandi samfelagið og deyva minnilutabólkin í landinum. Vit royna sum frægast at røkka vanliga samfelagið, men megna tað ikki, av tí at eingin tolkur er tøkur.

Vit hava leingi gjørt vart við okkara støðu, og vita vit ikki, hvar málið nú liggur — hjá Landsstýrinum, Almannastovuni ella hjá Landsskúlafyrisitingini? — Málið er gamalt og hevur verið útsett ferð eftir ferð.

Nú er bikarið um at flóta yvir hjá okkum. Tað er ein spurningur hjá okkum deyvu, um tað loysir seg at búgva í Føroyum. Seinastu árini eru í minsta lagi 10 deyv rýmd av landinum orsakað av eini vantandi tolkatænastu.

Deyvafelag Føroya minnir við hesum Føroya Landsstýri á støðu okkara, og heitir á Føroya fólk um at stuðla okkum í at **byggja brúgv frá hoyrandi samfelagnum yvir til okkum við at stovnað verður tolkaútbúgving og tolkatænasta í Føroyum.**

Í Tórshavn, hin 4. april 1992
Deyvafelag Førova

Í Tórshavn, hin 4. apríl 1992.

DEYVAFELAG FØROYA

Viðmerking til Frank Davidsen

Í grein í Sosialinum h. 4. apríl viðgert tú m.a. bræv mítt viðv. ferðslutrygdini í undirsjóvartunnlinum, og havi eg hetta at siga (undirritaði hevur strikað undir): Tú sigur m.a., brot: »... **sum nú knappiiga stóra** (1) fyri trygdini í undirsjóvartunnlinum«, og eitt annað brot: »sjálvt um **henda ruta** (2) ikki hevur nakað beinleiðis við okkara ferðsluráðgeva at gera, so kundi ein hóskandi spurt, um hann hevur gjørt sær nakra hóming av **trygdini, tá ferjan fer fullsett um sundið** (3) á hægstu summartíð. Ella **setir hann kikaran fyri blinda eygað** (4) í strembanini eftir at stuðla undirskriftaherferðini hjá studentunum í Hoydølum«, brotið liðugt.

Viðmerkingar:

1. Sum hjálagda bræv vísir, er spurningurin reistur h. 14. mars í -89, tað merkir fyri stívliga trimum árum síðan.

2. Gott hevði verið at vitað, hvar markið gongur, tá ið tað snýr seg um arbeiðsøkið hjá ferðsluráðgevanum.

3. Vit hava skipaeftirlit, ið tekur sær av trygdini á sjónum og arbeiðir eftir lógum, sum Føroya Løgting hevur smíðað. Um trygdin er ov vánalig har, eigur løgtingið so ikki at seta hóskandi lóg í gildi?

4. Ferðsluráðgevin roynir at seta kikaran fyri eyguni á løgtingsmanning okkara, og hann vónar, at hon sær álvaran í hesum máli. Í øðrum londum eru heilt greiðar reglur fyri at flyta vandamikil evni, men í Føroyum kunnu persónbilar lættliga enda í einum tunnli millum bilar við bensini, olju, gassi, dynamitti, sýru, ilt og øðrum vandamiklum evnum. Er ikki tíðin komin, tá ið vit eiga at seta tílík trygdarkrøv í gildi her heima hjá okkum? Um alt landið? Tíðin fer at vísa, um kikarin er settur fyri blinda eygað.

Mær vitandi skal ferjusambandið niðurleggjast, um tunnil verður gjørdur. Allur flutningur fer tá fram í hesum tunnli við tveimum av landsins longstu og brattastu brekkum. Tí, mín góði vinur Frank, heldur tú ikki, at eisini ferðslutrygdin eigur at verða gjølla viðgjørd, áður enn fólk, fæ og farmur noydist niður haðar, um tey skulu um Vestmannasund? Ella er tað óneyðugt?

Illa dugi eg at hugsa



RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

Landsverkfrøðingurin
Tinghúsvegi 7,
100 TÓRSHAVN

Tórshavn 14.03.1989

Viðv.: Undirsjóvartunnlinum Streymoy-Vágoy.

Í sambandi við omanfyri nevnda arbeiði hevur Ráðið fyri Ferðslutrygd sín náttúrliga áhuga í ferðslutrygdini í tunlinum, sum er tann fyrsti av sínum slagi her í Føroyum. Vit hava kortini ikki enn havt høvi at seta okkum inn í, hvussu tann spurningurin setlandi verður loystur.

Undirritaði heitir tí við hesum á Landsverkfrøðingin at fáa tað tilfarið, ið lýsir, hvussu trygdarspurningurin verður loystur. Beiði hvussu ferðslan sjálv skal ganga í og áðrenn tunnilin og, hvat verður gjørt, um eitt hvørt óhapp hendir í ella við tunnilin.

Vinarliga

Hans J. Hermansen

Hans J. Hermansen, ferðsluráðgevi

mær, at nakar við ábyrgdarkenslu fer at bjóða fólki ótryggari flutning enn tann, sum er. Kann henda, tunnilin er tryggari enn ferjusambandið, men tað vita vit illa, fyrr enn tað er kannað. Trygdina, bæði á landi, á sjógvi og undir landi/sjógvi eiga løgtingsmenn at kenna: Teir smíða lógirnar.

Sum sagt fyrru ferð snýr málið seg fyri mítt viðkomandi einans um, um ferðslutrygdin er nóg væl viðgjørd, áður enn farið verður undir at gera tunnilin. Meiri kemur ikki frá mær í bløðunum í hesum máli.

Vinarliga

Hans J. Hermansen
ferðsluráðgevi

Rættleiðing til Thomas Arabo

Thomas Arabo roynir at skava út yvir ein greiðan spurning frá Jákup Müller.

Eg kann rættleiða teg, um tú ikki hevur skilt spurningin. Landsstýrið fekk samtykt á tingi at yvirmenninir í fiskiflotanum skuldu niður í løn.

Tá eitt semingsuppskot verður gjørt til lóg, so er mannagongdin tann, at antin verður verandi sáttmáli longdur, ella eitt stað ímillum krøvini og sáttmálan, aldri niður um galdandi sáttmála.

Tað, sum hendi var at reiðararnir søgdu, at yvirmenninir skuldu niður í løn, og hesum eftirlikaði landsstýrið. Tað var ongantíð talan um vanligt uppskot, men eitt krav frá reiðarunum, sum bleiv gjørt til lóg.

Hvør segði verkamannaflokkur.

Tað bleiv samtykt, at hesin bólkur av fólki skuldi niður í løn. Har næst bleiv enn einaferð sligið fast, at hesin partur av Føroya fólki ikki skuldi fáa frítíðarløn av teirra inntøku, men av tí intøku, sum onnur hava. Við øðrum orðum, øll skulu hava frítíðarløn av inntøkuni, uttan tey, sum eru reyðhærd. Tey skulu hava frítíðarløn av tí, sum tey myrkhærdu vinna.

Mær vitandi fær Thomas Arabo ikki frítíðarløn av inntøkuni hjá postboðnum.

Tú skrivar um diskriminering, er hetta ikki diskriminering við lit.

Christian Winthereig

HYGGIÐ HER

GERIÐ KVETTIÐ - keypið seymimaskinuna NÚ

Til og við **leygardegnum 11. apríl** lata vit

10% í **kontantavsláttri** og
5% í avsláttri við sáttmála

Vit hava opið:

Vanl. dagar frá kl. 9—17.30
Leygardagar til kl. 12.

Pf. MARJUN HEIMÁ
C. Pløyensgøta 4, 100 Tórshavn, **Tlf. 12531**

Hvalbiar sóknar Javnaðarfelag

boðar til
aðalfund
onsdagin 8. apríl kl. 19.00
í Gamla skúla

Nevndin

Vendelbo
Marmuláta 1 kg
Best og bíligast og í fittari leikuspann til børnini.

KFUK, Tórshavn

Konfirmantafest fyri foreldrum og konfirmantum verður í annaðkvøld kl. 20.00 (Holdini frá Vesturkirkjuni og holdið frá Havnar kirkju).

Meinigheitshúsið, Tórshavn

Streingjakórið venur í kvøld frá kl. 18.45—19.45.